# Fundur í Hvalbiar sóknar kommunu hin 22. november 2013

Møttir vóru: Trúgvi Gudmundarson, Rúni Thomsen, Eyðfinn Debes, Magni Bertholdsen, Martin í Nesi og Niels J. Thomsen. Jóhan Eli Poulsen var til skips.
Formaðurin bað um loyvi at taka tvey mál við aftrat – hesi koma inn sum mál nr. 11 og 12.

Fundurin varð settur kl. 17.30.

1. **Umsókn um stuðul til námsferð frá SIT2 flokki á Tekniska skúla.**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 500,-.

2. **Umsókn um stuðul við keyp av fløgu við V4-skemti.**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við keyp av 20 fløgum.

3. **Avtala við Landsverk um kavarudding 2013/2014.**
   Samtykt varð einmælt at taka undir við avtaluni.

4. **Skriv frá borgara um gøtuljós, benkur v.m.**
   Samtykt varð at svara, at kommunan arbeiðir við málinum.

5. **Sandbakkin í Hvalba – svar frá Mentamálaráðnum.**
   Samtykt varð at royna at fáa ein fund við Bjørn Kalsø.

6. **Umsókn um umbýti matr. nr. 9a og 9c í Hvalba.**
   Byggisamtyktin er broytt síðani umsóknin varð viðmælt tann 22.03.2012. Samtykt varð at viðmæla umbýtinum.

7. **Uppskot til løgtingslóg um heimatænastu, eldrarøkt v.m. til ummælis.**
   Samtykt varð at siga frá, at Hvalbiar Kommuna á ongan hátt tekur undir við uppskotunum.

8. **Onnur viðgerð av uppskoti til broyting av kommunustýrisskipan fyri Hvalbiar Kommunu.**
   Samtykt varð at útseta málið til komandi fund.

9. **Onnur viðgerð av fíggjarætlan fyri 2014.**
   Útreiðslurnar til rakstur eru settar til kr. 16.513.000,- og íløgurnar til kr. 2.400.000,-. Samtykt varð, at skattaprosentið framhaldandi skal verða 20,0% og barnafrádrátturin kr. 5.000,- pr. barn. Inntøkurnar eru mettar til kr. 17.605.000,-. Fíggjarlógin varð einmælt samtykt uttan viðmerkingar.

**10. Fyrsta viðgerð av eykajáttan fyri 2013.**

Umsóknin um eykajáttan á kr. 2.258.000,- varð gjøgnumgingin. Ongar viðmerkingar vóru til eykajáttanina.

**11. Umsókn um fíggjarligan stuðul til nýggjárshald í Nesi.**

Samtykt varð at stuðla við kr. 10.000,- við fimm atkvøðum fyri.

**12. Mál frá Vega- og havnanevndini (framløga Eyðfinn Debes).**

Sp/f E-Grevstur hevur ein arbeiðsskúr til sølu fyri kr. 50.000,- uttan MVG. Samtykt varð einmælt at keypa skúrin.

**13. Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.**

**Tekniska nevnd:**

- Umsókn um byggiloyvi til uppíbygging á matr. nr. 48k, Hvalba.

**14. Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**

**Tekniska nevnd (framløga Magni Bertholdsen):**

- Umsókn um byggiloyvi matr. nr. 48k:
  Samtykt varð at geva byggiloyvi sambært givnum upplýsingum og tekningum og at bygt verður sambært byggisamtyktini.

**Trivnaðarnevnd:**

- Róland Joensen – fyrstuhjálparaskeið:
  Rúni hevur tosað við Róland um prís. Hann sigur, at prísurin er kr. 300,- pr. luttakara upp til 20-30 fólk.

**15. Ikki alment mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir.

Fundur lokin kl. 21.00

| | | |
|---|---|---|
| Trúgvi Gudmundarson | Rúni Thomsen | Eyðfinn Debes |
| Magni Bertholdsen | Martin í Nesi | Niels J. Thomsen |